## Landskrona er at finna millum undrini

Norska blaðið hevur millum lesarar sínar gjørt kanning, um hvørt fótbóltsundur, teir meta hægst, og norðmenn hava hug at samanbera undrini, ið Liverpool og Manchester United framdu í ávíkavist 2005 og í 1999, tá hesi bæði liðini í hvørjum føri vendu háttandi tapi, til sigurs í sjálvastu Champions League finaluni. Noreg hevur eisini brúk fyri einum undri í kvøld, um tað skal eydnast teimum at koma til EM-endaspælið, tí ikki bert mugu teir vinna í Malta, men eisini má Turkaland tapa móti Bosnia-Herzegovina í turkiska heksaketlinum. Landskrona verður á einum lista, saman við avrikunum hjá Riise og Solskjær í Champions League, mettir at vera á einum sjeynda plássi. Føroyski sigurin í 1990 móti Eysturríki í Landskrona, liggur í løtuni á einum sjeynda plássi við 3,28% av atkvøðunum. Føroyskir lesarar, ið halda, at Landskrona er størsta fótbóltsundurið, kunnu atkvøða á www.vg.no. Trýst á ”Fotball” í vinstru síðu á forsíðuni.



# Kend andlit á Tórsvølli

**Gianfranco Zola, sum var í fremstu røð hjá Chelsea um aldarmótið, er ein av venjarunum hjá italska U21 landsliðnum**

Eingin ivi er um, at teir, sum seinnapartin mikudagin fara at umboða Italia á U21 landsliðnum, næstu tíggju árini fara at verða millum bestu og kendastu fótbóltsspælararnar hjá italsku heimsmeistarunum.

### Teir ungu í skugganum

Í føroyskum fótbóltseygum mugu teir tó hesa ferðina góðtaka at standa í skugganum á einum, sum hevur sett fótbóltsskógvarnar við nógvum málum í, frá sær.

Talan er um Gianfranco Zola. Hann spældi í tíðarskeiðnum 1996-2003 í Chelsea, har hann var ógvuliga málsøkin. 34 ferðir umboðaði Gianfranco Zola, italska landsliðið.

Nú er Zola ein av venjarunum hjá italska U21 landsliðnum ella tekniskur ráðgevi, sum tað verður nevnt á heimasíðuni hjá FSF.

### Lærir kynsturið frá sær

Tá ið italska landsliðið vandi á Tórsvølli seinnapartin týsdagin var tað luturin hjá Zola at taka sær av teimum, sum skulu royna seg við fríspøkrum uttanvert føroyska brotsteigin.

### Kend andlit

Umframt Zola er ein annar italiumaður, sum í síni tíð spældi í Chelsea, við á Føroya ferðini hjá U21 landsliðnum. Talan er um Pierluigi Casiraghi. Tó varð tað ikki til teir nógvu dystirnar í bláa Chelsea búnanum, og noyddist hann at gevast vegna skaða.



*Mynd: football.fo*

# Robbie Williams og Michael Jackson leika í ensku liguni!

**Tað ljóðar sum ein skrøna, men tað passar. Robbie Williams spælir við Huddersfield, og Michael Jackson er liðfelagi við Claus Bech Jørgensen í Blackpool. Talan er sjálvandi um navnabrøður til teir meira kendu mennirnar frá tónleikavinnuni**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Chesterfield hevur ein leikari, sum eitur Danny Glover, navnabróðir við tann litta filmssjónleikaran frá “Lethal weapon” 1-4 og “The color purple” hjá Steven Spielberg.

### Tom Cruise og Michael Moore

Port Vale hevur ein Michael Jordan á liðnum. Men hesin er ikki so høgt flúgvandi, sum navnabróðurin var í kurvabólti. Og nú hevur eykaliðið hjá Arsenal ein Tom Cruise á liðnum hjá sær. Onkur nevnir hann “Mini-Cruise”. Í skotsku liguni leikar ein Michael Moore við gamla liðnum hjá Jens Martin Knudsen; Ayr United. Um hesin Michael Moore filmar á vøllinum, sigur søgan einki um?




*Tilvildarlig mynd av Blackpool*

### Søguligir navnabrøður

Tað hevur eisini verið talan um navnabrøður við kendar, søguligar persónar í ensku liguni. T.d. hevði Newcastle United ein Robert Lee á miðvøllinum. Hann bleiv sjálvandi nevndur “Generalurin”, og tá bleiv sipað til ovasta herleiðaran hjá amerikonsku suðurstatunum í amerikanska borgarakrígnum, árini 1861-1865. Bretar eru eitt skemtingarsamt fólk burtur av, og teimum líkt verður nógv gjørt burtur úr hesum navnabrøðrunum, hvørs amerikansku navnabrøður hava gjørt seg galdandi í nútíð og fortíð. Sig so ikki, at fótbóltur kann verða stuttligur!